# Ein stór ørk til børnini



*Ymisk djór eru vanliga at síggja í Nesvík. men leygardagin verða tey fleiri og fjølbroyttari*

*Mynd: trubodin.fo*

**Leygardagin verður serstakur familjudagur í Nesvík. Tá skipar sunnudagsskúlin hjá Heimamissiónini fyri einum Nóa-degi.**

FAMILJUDJÓR
*Snorri Brend*
*Snorri@sosialurin.fo*

**Nesvík: -** Tá vit hugsa um Nóa hugsa vit eisini um djór, siga fyrireikararnir.

Á hesum familjudegnum í leguhúsinum í Nesvík verða tí sjálvandi eisini nógv livandi djór, bæði vanlig djór og minni vanlig djór.

Millum annað verða kúgv, hestar, hundar, fiskar, kaninir og onnur djór at síggja. Ætlanin er eisini, at nøkur av djórunum fara at vísa síni kynstur, umframt at okkurt serligt verður til børnini.

Formaðurin fyri landsnevndini í sunnudagsskúlanum, Ejvind Mouritsen fer at greiða frá um skapanina, og um, tá ið Nóa fór inn í ørkina við øllum djórunum.

Í samband við framførslu sína hevur hann latið gera eitt modell av ørkini hjá Nóa við fleiri av djórunum. Hetta verður gjørt í lutfallinum 1:150, og sum verður at síggja í Nesvík henda dagin.

Sunnudagsskúlin bjóðar kaffi, te, saft og kakur. Áðrenn tiltakið endar verður møguleiki at keypa grillaðar pylsur við breyði.

Atgongugjaldið er 20 krónur fyri hvønn.

# Flest ferðsluóhapp fríggjadagar

**Eitt yvirlit frá Landsverki vísir, at flestu ferðsluóhappini á kommunalum vegum henda fríggjadagar kring oyggjarnar. Tó eru flestu ferðsluóhappini á Sandoynni og í Suðuroynni mikudagar.**

FERÐSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Í yvirlitinum sæst, at bæði á kommunalum vegum og landsvegum henda flestu óhappini fríggjadagar.

Men um hugt verður eftir einstøku økjunum kring landið er býtið ikki tað sama.

Í Suðuroynni henda flest óhapp mikudagar og nærum eins nógv fríggjadagar, meðan ein á Sandoynni kann staðfesta, at har henda nógv tey flestu óhappini mikudagar.

Í Vágum henda flestu óhappini mánadagar, meðan ein í Eysturoynni, Norðoyggjum og í Streymoy kann staðfesta at fríggjadagar eru flestu óhappini á teimum kommunalu vegunum.

Nevnast kann hinvegin, at einki óhapp hendi á kommunalum vegum á Sandoynni fríggjadagar, og at einki óhapp hendir á landsvegunum leygardagar á Sandoynni og hósdagar í Vágum.

# Sleppa at royna síni fótbóltsevnir

**Tað gongur væl hjá felagsliðnum EB/Streymi í løtuni. Hetta smittar helst eisini yvir á tey fótbóltshugaðu børnini.**
**Í Hósvík fáa hesi nú ein sparkivøll við graslíki, har tey sleppa at royna síni evni sum fótbóltsleikarar.**

BØRN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Hósvík:** Børnini í Hósvík sleppa um stutta tíð at sparka bólt á einum vølli í heimbygdini.

Í síni tíð var ætlan at gera tríggjar slíkar vøllir í Sunda kommunu, og varð ein ætlan løgd um at gera slíkar í Haldórsvík, Hósvík og á Norðskála.

Vøllurin í Haldórsvík er longu gjørdur, men nú verður farið undir tann næsta í røðini.

Á fundi í teknisku nevnd í Sunda kommunu fyrr í mánaðinum varð samtykt, at gera ein sparkivøll í Hósvík.

Á sama fundi varð somuleiðis samtykt, at økið rundan um henda vøllin skal gerast sum eitt spælipláss.

**250.000 kr.**

Mánakvøldið var fundur í Sunda kommunu, og tá varð samtykt at gera henda vøllin.

Tekniska umsitingin í kommununi metir, at parturin hjá kommununi í hesi ætlanini verður um 250.000 kr.

Á bygdaráðsfundinum varð somuleiðis samtykt, at lata upp í hendurnar á teknisku nevndini at finna hóskandi støð til vøllin.

Hetta uppskotið varð einmælt samtykt.

## STUTT SAGT

### Fleiri fótbóltsvøllir til børnini

**Skúvoy:** Fóltbóltshugaðir skúvoyingar kunnu um stutta tíð síggja fram til at sparkivøllurin í bygdini fer at verða liðugur.

Arbeitt verður í løtuni við hesum vølli, og sum skilst skal ein somuleiðis gerast á Sandi í næstum.

Líknandi sparkivøllir finnast longu í Skopun, og fyrr í summar kundu dalbingar taka ein slíkan í nýtslu.

**sb.**

### Skila fáast á leysgangandi hundum

**Sundalagið:** Nú skal skil fáast á vansan við teimum leysgangandi hundunum í Sunda kommunu.

Kommunan hevur gjørt eina samstarvsavtalu við avvarðandi myndugleikar um upptøku av leysgangandi hundum og øðrum djórum.

Á fundi fyrr í hesum mánaðinum hevði trivnaðarnevndin hetta málið til viðgerðar, og mælti tá bygdaráðnum til at gera eina slíka samstarvsavtalu. Mælt varð somuleiðis til at samstarva við aðra kommunu um aktingarfólk og um eitt stað at varðveita hesi djórini.

Á fundi í bygdaráðnum mánakvøldið samtykti bygdaráðið einmælt ætlanina um eitt slíkt samstarv.

**sb.**

### 4000 dagar í føroyskum sjóøki

**Fiskivinna:** Fram til 1. august høvdu útlendsk fiskifør roynt í slakar 4000 dagar í okkara sjóøki – nágreiniliga 3.973 dagar.

Ikki óvæntað eru tað russisk fiskifør, ið eiga flestar av hesum fiskidøgunum. Skip hagani hava roynt her í 1659 dagar, meðan íslendsk skip veiddu her í 1166 dagar.

Í yvirlitinum um útlendsku fiskivinnuna sæst, eingi skip úr Írlandi, Portugal, Estlandi ella Japan hava verið í føroyskum sjóøki higartil í ár.

Íalt hava útlendsku fiskiskipini fiskað 355.000 tons – av hesum fer svartkjafturin við megin-partinum, nevniliga góðum 300.000 tonsum.

**sb.**



*Útlendsk fiskifør hava fiskað góð 355.000 tons í føroyskum sjóøki higartil í ár*